*Framhald av síðu 16*

Myrdur í køkinum á fimtu hædd! Ein annar møtti einum sonnum kúluregni, tá hann trein út úr Mercedesbili sínum, og hjá einum triðja kappingarneyta brendi bryggjaríið í grund. At síggja til eftir eitt óhapp.

Og meðan hetta hendi, var Bravo-International brádliga eitt av stóru bryggjaríunum í landinum!

## Uppreisn í Íslandi

Og við pengum í lummanum kundu menninir nú fara aftur til Íslands, har navnið á pápanum skuldi reinsast. Og tað varð eisini gjørt við manér.

Umvegis Samson Holding, sum yngri Bjørgfinnur og Magnus Thorsteinsson høvdu valdið á, varð Landsbankin keyptur. Eitt keyp, sum fekk ikki sørt av mótmælum við sær á vegnum, tá Bjørgfinnur eldri var ein av atvoldunum til, at ein bankabjarginv av Fiskaríbankanum varð neyðug í síni tíð. Og at hesin nú eisini varð settur í sessin sum nevndarformaður, kundi einamest síggjast sum eitt tekin um, at hann ikki bara var aftur. Hann hevði fingið hevnd, og hann hevði prógvað, at dugur var í. Eisini hóast politiskt rok stóðst av handlinum, sum av fleiri andstøðutinglimum varð skýrdur sum eitt dømi um, hvussu politiskar vinartænastur vórðu veittar, nú almennu ognirnar skuldu avhendast.

Men ævintýrið endaði ikki bara við hesum. Miseydnaða kappingin við Eimskip var í síni tíð høvuðsatvoldin til trupulleikarnar hjá eldra Björgolfi, og her keyptu teir tríggir 40% av partapeninginum, áðrenn teir umskipðu felagið í fleiri smærri eindir. Umvegis Landsbankan keyptu teir eisini 25% av íløgufelagnum, Burderas, sum yngri Björgolfur átti. Gaman í eru eisini 17.000 aðrir íleggjarar í Burderas, men tað eru framvegis teir tríggir, sum hava valdið í felagnum, og umvegis hetta hava teir eisini keypt seg inn í hópin av øðrum fyritøkum. Eisini fyritøkum, har Landsbankin hevur beinleiðis áhugamál, og hetta er nakað, sum seinastu tíðina hevur verið atvold til ótta.

Í mun til flestu av grannalondum okkara, so er einki mark fyri, hvussu íslendskir fíggjarstovnar kunnu vera bæði lánveitarar og eigarar av fyritøkum. Hetta hevur fingið íslendska fíggjareftirlitið at taka gula kortið úr lummanum, tí tey meta vandan fyri ovurupphiting av búskapinum vera ov stóran. Og ikki minst, so kunnu slíkar konstruktiónir, har bankin og vinnulívið eru ov nær tengd, bresta sum sápublørur, um eitt veruligt hóttafall kemur. Ávaringar um tað sama hava eisini verið frammi í eitt nú Týsklandi og Japan, har kross-eigaraskapur millum bankar og vinnulív ikki hevur nakrar forðingar.

## Russiskir pengar

Spurnartekini um fíggjarligu himmalsferðina hjá teimum trimum monnunum handan Burderas, eru tó ikki sterkastu ákærurnar, sum Ian Griffiths kemur við.

Hóast hann í grein síni ikki gevur nakra greiða staðfesting, so sigur hann harðari enn spakuligt, at íslendska ævintýrið í veruleikanum er fíggjað við russikum mafia-pengum, heldur enn vøkstri og liberaliseringum.

Eitt ævintýr, sum hevur ført íslendskar íleggjarar við sjey-míla ferð inn á størstu europeisku marknaðirnar. Og sum til dømis hevur gjørt tað møguligt at gera eina roynd at yvirtaka risa-stóru Marks & Spencer handilsketuna, sum einsamøll hevur ein eins stóran umsetning, sum alt tað íslendska samfelagið.

Tað hevur eins og hjá the Independent givið illgruna um, at russiskir oligoarkar, so sum Roman Abramovich og aðrir, snøgt sagt nýta Ísland sum eina millumstøð, tá milliaraupphæddir teirra skulu nýtast til at fáa valdið á stórum europeiskum fyritøkum. Ført verður eisini fram, at Reykjavík við strategisku plasering síni mitt millum Moskva og New York er tann perfekta millumstøðin í so máta.

Sjálvur tykist Griffiths tó í størri mun at fylgja pengaslóðini heldur enn teirri geografisku. Hann vísir á, at seinastu trý árini hevur ein stórur peningastreymur verið til íslendska virðisbrævamarknaðin úr londum sum Guernsey og Luksemburg. Av Guernsey vórðu at kalla ongar íslendskar íløgur framdar fram til 2001, men í 2003 var hetta talið komið upp á 1 mia kr. Og úr Luksemburg er peningastreymurin um sama mundi øktur úr 400 mió kr. upp í 2,3 mia kr. í fjør. Nakað sum ger íleggjarar í Luksemburg til størstu útlendsku íleggjararnar í Íslandi.

Tað hevur gjørt tað møguligt hjá íslendskum fyritøkum av venda eini niðurgongd í 2002 til ein metstóran vøkstur, sum síðani miðskeiðis í 2002 hevur verið 300%!

## Hvar liggur sannleikin?

Men hetta eru sum sagt gitingar, tó at keldurnar til hesar tykjast rættiliga vælgrundaðar.

Í Íslandi hevur tað einamest verið Støð2, sum hevur viðgjørt málið, men enn eru so eingi prógv av nøkrum slag funnin fyri hesum.

Og sambært fíggjarserfrøðinginum, Larus Welding, sum starvast hjá Landsbankanum, eru heilt aðrar orsøkir til íslendska ævintýrið:

Íslendska pensiónsskipanin hevur gjørt, at tørvurin á íløgum er størri enn tað, sum kann nøktast í Íslandi.

Íslendski virðisbrævamarknaðurin, ICEX, hevur havt sera stóra framgongd - 60% í fjør - og tað hevur drigið veldugar útlendskar íløgur til landið.

Íslendingar hava havt ein væl skipaðan fiskiskap, sum hevur givið eitt veldugt ríkidømi.

Og loksins, so sigur hann, at íslendingum dámar at takast við teir stóru. Og tí verða nógvar íløgur gjørdar í eitt nú Bretlandi.

Sjálvir leggja Björgólfarnir báðir ikki so nógv í at gera viðmerkingar, men onkur er tó follin kortini.

- Stóri vøksturin í Íslandi hevur gjørt okkum varugar við avmarkingarnar, sum liggja á heimamarknaðinum, og tí hava vit hugt uttanlands. Og við ungum væl útbúnum starvsfólkum, sum hava evnini til at hugsa bæði øðrvísi og meira kreativt, hava vit í nógvar mátar brotið úr nýggjum, sigur tann eldri teirra.

Og sonurin staðfestir, at talan bert er um at gera skilagóðar íløgur.

- Eg dugi væl at finna fyritøkur, sum eru undirmettar, og sum kunnu mennast. Og eg haldi meg hava ein góðan eginleika at finna dugnalig fólk at stýra hesar fyri meg, sigur hann.

Er hetta esinasta rætt, so er einki at ivast í, at talan er um eitt fíggjarligt flogvit av teimum heilt stóru. Men hinvegin eru so eisini tey, sum halda at talan er um aðrar kreftir, sum standa handan brádliga vøksturin. Ikki bara hjá Burderasbólkinum, men hjá samlaða íslendska íløgu-ævintýrinum.

Keldur: the Guardian, Berlingske Tidende, the Independant, MobileMonday.net, Morgunblaðið



*Himmalvendu tornini í Skt. Pætursborg gjørdust á sín hátt ímyndin av handilsskapinum hjá Burderas bólkinum. Eitt felag, sum hevur 17.000 íleggjarar, men har Björgólfur Guðmundsson, sonur hansara, Björgólfur Þór Björgólfsson og partnari teirra, Magnus Thorsteinsson, sita við valdinum*